Vikuskiftis Sosialurin



## Ólavur livir við tilgjørdum hjarta

Neystið hjá Árnafjarðar Róðrarfelag kann nýtast til annað enn kappróður. Mikukvøldið í komandi viku verður tað karmur um ein fyrilestur um, hvussu tað er at ganga við tilgjørdum hjarta. Hetta veit 27 ára gamli Ólavur Thune alt um, og fer hann at greiða frá sjúkrasøgu síni og um, hvussu hann hevur tað í dag, nú hann hevur gingið við einum Heartmate 2 í eitt ár. Fyrilesturin byrjar kl. 19 og fer bussur at koyra frá bókasavninum í Klaksvík til Árnafjarðar ein hálvan tíma áðrenn. – Eg havi havt mínar upp- og niðurtúrar. Í dag kann eg bara staðfesta, at Heartmate 2 eigur lívið í mær, sigur Ólavur í Streymnesi, sum hann verður nevndur millum manna. Hann hevur nú umsíðir fingið tað so gott, at hann kann koma hendavegin at siga frá síni søgu fyri áhugaðum.



*Útgerðin hjá Ólavi sær ógvuslig út, men hon eigur kortini lívið í honum*

# Spæl millióningur og vinn 50.000 krónur




*Soleiðis sær íløguspælið út á heimasíðuni hjá Kaupthing Føroyar*

**Tann 10. september byrjar eitt nýtt íløguspæl, sum Kaupthing Bank skipar fyri í samstarvi við Sosialin. Vinningar á 50.000 krónur, 25.000 krónur og 10.000 krónur verða latnir til ávikavist besta, næstbesta og tríðbesta spælara. Spælt verður í 3 mánaðir**

ÍLØGUSPÆL
*Hilmar Simonsen*

Tú byrjar við 1.000.000 krónum, sum tó eru fiktivar. Síðani gerst tú íløgur í partabrøv fyri í minsta lagi helvtina av hesum, tað vil siga hálva millión krónur, áðrenn helvtin av spælitíðarskeiðnum er runnin. Spælitíðarskeiðið er 3 mánaðir. Síðani koyrir tað bara, og tað er upp til tín, hvussu ofta tú selir burtur av og keypir av nýggjum, og um tú keypir fyri alla milliónina ella letur nakað standa eftir. Tað sum spælið snýr seg um er at hava vunnið mest pening í tíðarskeiðnum upp á 3 mánaðir, og tí ræður um at seta peningin rætt – har hann kann nøra seg sum mest.

Til ber at keypa partabrøv í øllum norðurlendskum fyritøkum, sum eru skrásettar á OMX. Tað vil siga íslendskum, donskum, svenskum, finskum og, ikki at gloyma, føroyskum fyritøkum. Sum øllum kunnugt so eru tríggjar føroyskar fyritøkur børsskrásettar, nevniligar Atlantic Petroleum, Føroya Banki og Eik Banki. Av tí at norskar fyritøkur ikki eru skrásettar á OMX, so ber í hesum spælinum ikki til at gera íløgur í norskar fyritøkur.

### Veruligir kursir

Samanborið við tað veruliga lívið, har langt frá øll hava ráð ella møguleika at seta pening í partabrøv, so hava øll møguleika at royna seg í hesum spælinum. Og tað við lít, tí ein og hvør luttakari fær eina millión fiktivar krónur at royna seg við, og so er at royna at fáa sum mest burtur úr hesi talentini.

Hóast talan er um fiktivar íløgukrónur, so standa nógvir veruligir pengar upp á spæl. Tilsamans verða 85.000 krónur latnar í vinningum til ávikavist besta, næstabesta, og tríðbesta spælara. Hesar verða býttar soleiðis, at besti íleggjarin fær 50.000 krónur í reiðum peningi, tá spælitíðarskeiðið upp á 3 mánaðir er av, næstbesti 25.000 krónur, og tríðbesti 10.000 krónur.

Á heimasíðuni hjá spælinum www.ilogur.fo verða allir kursir leypandi dagførdir, tó við 15. minutta seinking, so til ber at fylgja við, hvat kostnaðurin fyri partabrøv er til eina og hvørja tíð, og hvussu íløgurnar hjá einum sjálvum menna seg. Og her er talan um veruligar kursir, sum verða heintaðir beinleiðis frá OMX og inn á heimasíðuna. Sostatt er talan um eitt spæl, sum eins væl kundi verið veruleiki. Kostnaðurin fyri hvønn partabrævahandil er 300 krónur, og tað skal havast í huga, tá handlað verður. Tess oftari handlað verður, tess oftari skal ein gjalda 300 krónur í ómaksgjaldi, hóast hetta ikki hevur stórvegis týdning, um handlað verður fyri størri upphæddir.

### Fyrsta føroyska íløguspælið

Hetta er fyrstu ferð at eitt føroyskt íløguspæl fer av bakkastokki, og hóast tað finnast fleiri líknandi spøl í útlondum, so er tað nakað serligt at spælið er føroyskt við føroyskum vinningum, latnir av Kaupthing Bank í Føroyum, sum eisini skipar fyri spælinum.

Teir 3 mánaðirnar, meðan spælið koyrir, verða javnan tíðindir at frætta í Sosialinum, har tað eisini verður kunnað um mangt og hvat. Kaupthing og Sosialurin bjóða hervið øllum áhugaðum ókeypis at tekna seg til spælið, sum kann koma at vísa seg at vera ein góð byrjan til at gerast íleggjari. Her er einki at missa, men nógv kann vinnast, so eingin grund er at halda sær aftur.

Tilmelding fer fram á heimasíðuni www.ilogur.fo frá mánadegnum 10. september, sama dag sum spælið byrjar, og tað kostar einki at luttaka.

## Spælireglur

Øll, sum eru áhugað í spælinum kunnu taka lut.
Byrjunarupphæddin hjá øllum kr. 1.000.000.
Talan er um eitt spæl, har allar upphæddir eru "fiktivar".
Spælt verður í 3 mðr. Aftaná 3 mðr., verða nummar 1,2 og 3 í funnin.
Partabrøv, sum møguleiki er at keypa og selja, eru norðurlensk partabrøv, sum eru skrásett á OMX.
Handilskostnaðurin í samband við hvørja sølu og hvørt keyp er 300 kr.
Møguleiki er altíð at keypa og selja.
Allir kursir verða dagførdir við 15. minutta seinking.
Kaupthing Bank hevur ábyrgdina av spælinum.
Fyrispurningar kunnu bert sendast umvegis heimasíðuna hjá Íløguspælinum undir "Samband við okkum".
Tað er ikki møguleikt at ringja til Kaupthing Bank við fyrispurningum, men til ber altíð at skriva til ilogur@kaupthing.fo.
Sami persónur hevur bert loyvi at skráseta seg einaferð (Kaupthing tilskilar sær rætt at strika ein spælara, sum hevur skrásett seg fleiri ferðir).
Til tess at vera gildugur vinnari, skal samlaða íløgan verða gjørd í eitt ella fleiri partabrøv fyri minst kr. 500.000 í minst helvtina av spælitíðarskeiðnum. T.v.s at um ein spælari hevur ligið við meira enn 50% í reiðum peningi í meira enn 1,5 mánaða, hevur hann/hon ikki møguleika at vinna.

## Kunnandi tiltak í Miðlahúsinum

Í samband við nýggja íløguspælið, sum Kaupthing Bank skipar fyri í samstarvi við Sosialin, verður kunnandi tiltak og hugnakvøld í Miðlahúsinum mikukvøldið 5. september klokkan 20. Greitt verður frá íløguspælinum, sum byrjar mánadagin 10. september 2007, og møguleiki verður at royna tað á teldum á staðnum. Á skránni verður framløga um partabrøv, livandi tónleikur við Guðrið Hansdóttir, kunning um íløguspælið, umframt at borðreitt verður við onkrum leskiligum.